# Finn títt valevni

Ovast á Portalinum finnur tú valsíðuna hjá Sosialinum. Har ber til at finna títt valevnið og at luttaka í kappingini um, hvørji 33 valevni verða valdÍ hesum heitu valtíðum, hevur Sosialurin framleitt eina stuttliga skipan, sum liggurá Portalinum. Við valkanningini á Portalinum ber til at finna útav, um tað kanska er eitt heilt annað valevni enn títt lokala, sum er samt við tær. Ella um tú kanska átti at atkvøtt fyri einum øðrum flokki, enn tú hevur vant teg við. Í kanningini fært tú 15 spurningar um øll møgulig politisk viðurskifti. Tú skalt krossa av, hvussu samd ella ósamd tú ert við spurningarnar. Hetta hava valevnini eisini gjørt, og tí ber til at samanbera svarini hjá tær við svarini hjá valevnunum. Tá ið tú hevur svarað spurningunum, koma tey valevnini fram, sum matcha best við tíni svar.



# Samgongan hevði fallið

Hevði landstingsval verið í Grønlandi nú, hevði samgongan millum Siumut og Atassut mist meirilutan, og landsstýrið hevði fallið. Tað sæst í einari kanning, sum HS Analyse og blaðið Sermitsiaq hava gjørt. Eftir kanningini hevði Siumut mist tveir av sínum 10 tinglimum, meðan Atassut hevði varðveitt sínar seks. IA og Demokratarnir høvdu fingið hvør sínar átta tinglimir og kundu sostatt skipað samgongu við 16 av teimum 31 tinglimunum.

# politikk



– *Í Hvalvík eru fyri so vítt bert tveir flokkar í at velja – Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin. Eg velji tann seinna, sigur Torfinn Djurhuus*

> *Tann dagin tunnilin til Skálafjørðin gerst veruleiki, fer hetta økið at missa sín týdning*
>
> *(Kvinna í Sundalagnum)*

> *Støðan á Studentaskúlanum í Hoydølum og á Trøðni sigur mær bara, at her vantar nógv í*
>
> *(Torfinn Djurhuus, Hvalvík)*

veruliga ynskja at gera nakað fyri tann føroyska skúlan.

- Vánaliga støðan á Studentaskúlanum í Hoydølum og á Trøðni sigur mær bara, at her vantar nógv í, sigur Torfinn, sum fer at greiða atkvøðu fyri Sambandsflokkinum.

## Nógv hjartamál

Onkur fær kanska ta fatan at talan er um eina svart/hvíta støðu í Streymnesi. Men so er ikki.

Fleiri av teimum, vit tosaðu við siga seg ikki hava skil á politikki og hava bert við hálvum oyra lurtað eftir tí, sum higartil hevur verið ført fram av teimum 171 valevnunum.

Tey duga kortini at síggja, at føroyska samfelagið er eftirbátar á mongum økjum – bæði innan tað sosiala, mentanarliga og ikki minst tá talan er um støðuna í fólkaskúlanum.

- Varð eg uppstillað – og vald! – hevði eg beinanvegin farið undir at gera okkurt, soleiðis at sjúkrahúsverkið bleiv betri, sigur Hansina Johannesen, ið arbeiðir í handlinum INN á Norðskála.

## Atkvøðan fer úr bygdini

Ein eldri maður er farin út at ganga sær ein túr á Streymnesi í góðveðrinum henda hósdagin.

- Tað er altíð gott at fáa sær fríska luft, sigur hann.

Sjálvur er hann javnaðarmaður, hevur verið stillari hjá flokkinum og er tí sera spentur uppá valið. Við seinasta og næstseinasta løgtingsval hevði flokkurin einki umboð í løgtinginum úr Norðstreymoy.

Flokkurin hevur í roynd og veru ongatíð staðið serliga sterkur í økinum, men hevur kortini havt umboðan á tingi í 80'unum og 90'unum.

- Men vit hava havt ein sera góðan landsstýrismann hesi seinastu fýra árini – Hans Pauli Strøm. Og eg vænti, at mín atkvøða hesaferð fer av bygdini og vestur um fjall til Vestmanna, sigur maðurin.

Hann takkar fyri prátið og gongur leiðina víðari –



*Við bert einum hanagleivi ímillum í Streymnesi búgva teir báðir landsstýrismenninir Heðin Zachariassen (v.m.) og Magni Laksáfoss. Her verða teir interviewaðir av Snorra Brend frá Rás 2 og Sosialinum*

## Sundalagið – eitt øki í miðjuni

Í dag er Sundalagið at meta sum eitt miðøki í Føroyum. Øll ferðslan til og frá Eysturoynni og Norðoyggjum gongur gjøgnum hetta økið, og skulu fólk sunnanfyri norðurum, er bert henda leiðin at fara eftir.

Nógv virksemi er í økinum kring Sundalagið og nógvar tænastur eru á góðum støði, millum annað innan barnaansing, skúlagongd og eldraøkið.

– Ja, tað er eingin ivi um, at uttan arbeiðið hjá Heðin (Zachariassen, blað.) so var einki røktarheim komið her í bygdini, staðfestir ein kvinna.

Men treyðugt so, tað er altíð okkurt sum vantar – millum annað at fáa eina heilsusjúkrasystir til tey eldru børnini og møguleikarnir at sleppa til talupedagog.

Spurningurin sum fólk eru upptikin av er, hvussu leingi hetta fer at vara aftrat. Sunda kommuna hevur lagt eitt stórt arbeiði í at útbyggja og samansjóða tær mongu bygdirnar í teirri samanløgdu kommununi, og líkt er til at hetta hevur eydnast væl.

- Tann dagin tunnilin til Skálafjørðin gerst veruleiki, fer hetta økið at missa sín týdning. Tí er av størsta týdningi at tað verður væl útbygt NÚ, sigur ein kvinna.